# Allan spælir ikki aftur í ár

**Eftir miðvísa venjing í hálvt ár fæst at síggja, um fyrrverandi KÍ liðformaðurin aftur verður førur fyri at spæla fótbólt**

SKADDUR KÍ SPÆLARI
*Jóannes Hansen*



*– Eg ætli mær at fylgja venjingarskránni, sum teir í Århus góvu mær, og so fáa vit at síggja, sum nú aftur hevur fingið ein álvarsligan skaða at dragast við*

Nú er greitt, at Allan Joensen í KÍ fer ikki aftur at spæla fótbólt í hesum árinum. Eftir vitjan hjá serfrøðingum í Århus í síðstu viku er staðfest, at talan ikki verður sum skurðviðgerð í hælsinuni, sum seinastu átta árini hevur hildið dugnaliga spælaranum nógv burtur frá fótbóltinum.

Tað var KÍ venjarin Ove Flindt–Bjerg, sum umvegis gamla felagið hjá sær, AaB, fekk samband við serfrøðingar í Århus, sum hava nógvar royndir við ítróttarskaðum og ikki minst av tí slagnum, sum Allan er og leingi hevur verið plágaður av. Allan vónaði, at tað eftir skurðviðgerð fór at bera honum til skjótt at koma fyri seg aftur, men nú staðfestir hann, at hetta verður av ongum.

– Teir søgdu seg ikki hava góðar royndir av skurðviðgerðum. Serliga ikki tá ið tað sum í mínum føri hava verið tvær royndir gjørdar við skurði. Ráðini, sum eg fekk, vóru at fara undir miðvísa venjing eftir ætlan, sum teir góvu mær við til hús aftur. Teir siga seg rokna við, at brunin verður burtur um eitt hálvt ár og harvið pínan, sum ber við sær, at eg ikki fái spælt, sigur 30 ára gamli Allan Joensen.

Venjingarætlanin hevur einki við fótbólt at gera. Talan er um rørsluvenjingar við elastikki og á javnvágsbretti, og so ber tað til at svimja og súkkla.

### Nyttar ikki at treiskast

Í 1996 fekk Allan Joensen, sum klaksvíkingar mettu at vera evnaríkasta spælaran hjá teimum, fyrstu ferð trupulleikar við fótliðnum. Í 1997 slitnaði hælsinan fyrru ferðina, og hon er slitnað eina ferð síðani tá. Báðu ferðirnar hevur verið roynt at bøta um skaðan við skurðviðgerð. Úrslitið hevur hvørgu ferðina verið nóg gott til, at Allan Joensen hevur vunnið fulla fótbóltsførleikan aftur. Eitt nú hevur hann havt trupulleikar av arrvevnaði, og brunin er skjótt komin aftur.

– Fótbóltshugurin hevur verið so góður, at eg havi treiskast meiri, enn eg ivaleyst átti at havt gjørt. Eg havi vant og spælt, inntil pínan hevur verið so stór, at tað als ikki bar til. Tað eru nógv dømi um, hvussu torført tað er hjá ítróttarfólkum at sleppa av við sovornar skaðar. Eitt feskt dømi er norðmaðurin Erik Mykland, sum Todi Jónsson hevur spælt saman við í FCK. Hann hevur verið til kanningar hjá somu monnum, sum eg var hjá í síðstu viku, og hann hevur fingið somu boðini. Tað er ov vandamikið at skera, har tað frammanundan er skorið fleiri ferðir.

*Hevur tú mót um, at tú aftur fert at spæla fótbólt á hægsta støði?*

– Eg vónaði, tá ið eg fór til Danmarkar, at tað fór at bera til at loysa trupulleikan, so eg fór at verða førur fyri at spæla heilt skjótt. Men soleiðis verður tað ikki. Eg ætli mær at fylgja venjingarskránni, sum teir í Århus góvu mær, og so fáa vit at síggja. Eg eri vónbrotin av, at eg ikki fái høvi at hjálpa KÍ, sum fyllir hundrað í ár, men tað gerst einki við tað. Eg eri fegin um, at útvegir vórðu gjørdir, so eg kundi koma undir serkøna hond. At tað verður strevið, og at freistingin at fara at venja, tá ið pínan verður minni, verður stór, ivist eg onga løtu í. Royndirnar seinastu nógvu árini hava víst, at tað nyttar ikki at treiskast, og tað má eg læra meg at liva við, sigur Allan Joensen.

# Nógvir altjóða eygleiðarar í Parkini

**Alt bendir á, at Todi Jónsson verður á beinkinum, tá ið FCK og Brøndby í annaðkvøld bresta saman frammanfyri fjøuti túsund áskoðarum**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*



*Áhugin fyri brakinum í Parkini er stórur. Og tað eru ikki bara danir, sum fara at fylgja við, hvussu leikur fer*

Í danska fótbóltsheiminum bendir einki á, at endaspurturin í superliguni og serliga lokaluppgerðin millum tey bæði stóru feløgini í høvuðsstaðnum, standa í skugganum av krúnprinsabrúdleypinum. Ella kanska er tað rættari at venda tí tann vegin, at stórdysturin í Parkini hóskvøldið er vorðið ein partur av øllum tí, sum gongur fyri seg í vikuni uppundir, at fótbóltshugaði tilstundandi kongurin fer at geva seg í hjúnarlag við tilstundandi Queen Mary.

Ein rúgva av útlendskum fótbóltskeypmonnum verður í Parkini. Danskir miðlar siga seg vita, at umboð fyri í minsta lagið tjúgu feløg aðra staðni frá fara at hyggja at. Talan er eitt nú um fleiri týsk feløg við umboðum fyri Bayern München á odda,og um umboð fyri fleiri feløg í næstbestu deildini í Onglandi.

Tað eru serliga ungu stjørnuskotini hjá FCK og Brøndby, sum áhugi er fyri. Hjá Brøndby eru tað framrættaðir spælarar sum Jonas Kamper, Thomas Kahlenberg og Martin Retov, og hjá FCK eru tað Hjalte Bo Nørregaard, Michael Silberbauer og ikki minst Jesper Bech.

Umboðsmaður hjá Jesper Bech er fyrrverandi Anderlecht og landsliðsspælarin Benny Nielsen. Hann sigur við danskar miðlar, at hann hevur fingið nógvar uppringingar og fyrispurningar um unga mannin. Svarið er tað sama hvørja ferð. Jesper Bech hevur tað gott í FCK, har hann er sáttmálabundin í tvey ár afturat.

### Todi bonkarkjans

Mánadagin høvdu flestu FCK spælararnir frí. Onkrir spælarar, sum hava verið skaddir, vandu, og Todi Jónsson vandi saman við teimum. Hóast Todi hevur verið í besta hópinum hvørja ferð nógvu tær síðstu ferðirnar, so hevur spælitíðin verið avmarkað. Tí er eingin orsøk hjá honum at hvíla so nógv, sum tað er neyðugt hjá teimum, sum síðstu tíðina hava spælt tveir strævnar dystir um vikuna.

Leygardagin vóru allir hinir álopsspælararnir frammanfyri Toda. Álvaro Santos og Zuma mannaðu tvær tær fremstu ódnirnar, og Jesper Bech var á miðvøllinum. Tá ið Zuma varð skaddur, varð Peter Møller settur á vøllin, meðan Todi noyddist at bíða inntil lítla løtu undan leikloki.

Tað er greitt, at Zuma ikki verður við í annaðkvøld. Tí er tað rættuliga upplagt, at Todi verður í hópinum. Men tað er lítið sannlíkt, at hann verður millum teir fyrstu ellivu. FCK venjarin, Hans Backe, segði í gjár við danskar fjølmiðlar, at Jesper Bech hevur fleiri ferðir víst, hvussu góður álopsspælari hann er. Tað vil við øðrum orðum siga, at Álvaro og Jesper Bech fara at manna FCK álopið í annaðkvøld, og at sammett við í Herning fer Michael Silberbauer at verða settur á miðvøllin í høgru, meðan Morten Bisgaard fer at verða fluttur í vinstra borð. Harvið fara Todi Jónsson og Peter Møller at bíða á beinkinum, og so fæst at síggja, um Todi hesa ferð verður settur frammanfyri ella aftanfyri nr. 32, sum Peter Møller verður nevndur í FCK.



# Elspa vann 16 kappingar

**Ikki færri enn níggju bólkamet vórðu sett í Klaksvík um vikuskiftið**

SVIMJING
*Jákup Mørk*



*Landsliðsvenjarin mundi fara hugagóður av aftur stevnuni. Tíðirnar hjá svimjarunum batna alsamt, og nú stendur eisini FM fyri framman, og tá hava fleiri svimjarar helst ætlanir um veruliga at toppa.*

**Svimjing:** Unglingameistarakappingin ( UM ) 7,8 og 9 mai 2004

Unglingameistarakappingin í svimjing varð hildin í Klaksvík um vikuskiftið. Sum vera man, so var spenningurin undan hesari stórur, og eftirfylgjandi var hugagóða staðfestingin, at tað í løtuni tykist ganga framá við rúkandi ferð innan svimjingina hjá yngru svimjarunum.

Ikki færri enn níggju bólkamet vórðu hesaferð sett, og tó at talan tykist vera um framgongd yvir ein breiðan kamb, so slepst ikki undan at nevna nakrar av einstaklingunum, sum gjørdu um seg.

Serstakliga var tað Elspa Mørkøre, sum tók lut í 16 av kappingunum á stevnuni. Og eisini vann tær 16! Men eisini onnur gjørdust nógv um seg. Pauli Øssurson Mohr setti eins og Elspa trý bólkamet, og Lisbeth L. Joensen tók sær av ikki færri enn 13 kappingum.

Eisini vóru nakrir svimjarar, sum ognaðu sær silvur- og bronsunálir. Hesi vóru Haraldur Eið úr Skeggjum og Christian S. Nielsen úr TS, sum fingu silvur. Guðrun H. Jacobsen úr HS, Rebekka Larsen úr Skeggjum og Vivian Müller úr VS fingu bronsu.

### Landsliðshópurin

Ein av áskoðarunum til kappingina var sjávlandi landsliðsvenjarin, Petur heðin á Fløttu, og hann hevði eisini formlig ørindi á stevnuni.

12 svimjarar skuldu takast út til kapping, har føroyskir svimjarar skulu kappast við svimjarar úr Hetlandi og Orkney-oyggjunum. Kappingin, sum talan er um, verður hildin í Havn 2. juni, og eru tey 12 føroysku umboðini tá hesi: Hanus Eysturdal HS - Jákup Øssursson Mohr FS - Kári á Høvdanum Skeggjar - Pauli Øssursson Mohr FS - Joan Símun Edmundsson Flot - Petur McIntosh HS - Nathalia Reinhardt Ægir - Elida Bjarnadóttir HS - Eyðbjørg Petersen Skeggjar - Elspa Mørkøre Skeggjar - Kirstin S. Rasmussen Skeggjar - Maria Vang TS.

Endaliga heiðursmerkjabýtið í kappingini gjørdist annars hetta:

**Samlaða úrslitið av kappingini gjørdist:**

| | Gull | Silv | Bronsu |
|---|---|---|---|
| HS | 30 | 33 | 14 |
| Skeggjar | 23 | 12 | 14 |
| FS | 22 | 3 | 3 |
| Flot | 18 | 15 | 13 |
| TS | 10 | 24 | 8 |
| Ægir | 7 | 4 | 14 |
| VS | 0 | 2 | 10 |

## Toppskorararnir

**Yvirlit yvir svimjararnar, sum vunnu flestu gullmerkini á Unglingameistarakappingini í Klaksvík um vikuskiftið**

| | |
|---|---|
| Elspa Mørkøre | 16 |
| Lisbeth L.Joensen | 13 |
| Pauli Øssursson Mohr | 12 |
| Nathalia Reinhardt | 7 |
| Jákup Øssursson Mohr | 7 |
| Beinir E. Danielsen | 7 |
| Hanus Eysturdal | 5 |



*Elspa Mørkøre var stóri gullslúkurin á kappingini. Hon streyk avstað við ikki færri enn 16 gullmerkjum*

## Metini

**Hesi bólkamet vórðu sett í Klaksvík um vikuskiftið**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Hanus Eysturdal | HS | 100m rygg | Bólkur 4 | 1.05.66 |
| Elspa Mørkøre | Skeggjar | 50m rygg | Bólkur 3 | 0.32.89 |
| Elspa Mørkøre | Skeggjar | 400m frí | Bólkur 3 | 4.52.29 |
| Elspa Mørkøre | Skeggjar | 200m frí | Bólkur 3 | 2.20.34 |
| Pauli Øssursson Mohr | FS | 200m bringa | Bólkur 3 | 2.58.90 |
| Pauli Øssursson Mohr | FS | 100m frí | Bólkur 3 | 1.02.63 |
| Pauli Øssursson Mohr | FS | 100m bringa | Bólkur 3 | 1.21.69 |
| Jákup Øssursson Mohr | FS | 100m blandað | Bólkur 3 | 1.08.04 |
| Liðsvimjing, dreingir | Flot | 4x100m frí | bólkur 3 | 4.36.46 |

(Joan Símun Edmundsson-Arnhold Davidsen-Remi Langaard-Jógvan E.O.Davidsen)



*Jákup Øssurson er eins og beiggin í eini rúkandi menning, og hann fekk eitt av bólkametunum, sum vórðu sett um vikuskiftið*

## Svimjiveitsla

**Svimjingin tekur nú táttin við gallaveitslu upp, og 22. mai verður rimmar tiltak á Hotel Føroyum**

GALLAVEITSLA
*Jákup Mørk*

Eftir FM-kappingina, sum verður komandi vikuskifti, fer eisini svimjingin at hava sína gallaveitslu. Hetta er veitslan, har svimjarar sjálvandi fyrst og fremst kunnu hittast og práta um svimjiárið, sum tá er av, og so er tað eisini her, at bestu svimjararnir verða funnir.

Skriv er sent ymsu feløgunum, har tey skulu siga frá, hvussu nógvir luttakarar koma til veitsluna, sum er ætla svimjarum, hjálparfólkum, nevndarlimum, stuðlum og øðrum, sum onkursvegna vara at svimjingini.

Sosialurin
– hevur fingið nýtt telefonnummar
tel 34 18 00
fax 34 18 01
heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo